# Tey fýra málini eru nokk munurin

**Í seinna InterToto Cup-dystinum hjá NSÍ móti Esbjerg fB megnaði NSÍ ikki tað sama sum í fyrra dystinum. Donsku bronsuvinnararnir vunnu ein tryggan 4-0 sigur, ið helst eisini er munurin á føroyskum og donskum fótbólti**

INTERTOTO CUP
*Terji Nielsen*



*Helgi L. Petersen úr NSÍ sær út til at vinna henda nærdystin, men annars vóru tað Martin Jensen, Hans H. Andreasen og hinir í Esbjerg fB, ið vunnu sjálvan dystin*

Lítið man vera at ivast í, at runavíkingar royndu sítt besta á Svangaskarði leygardagin. Í øllum førum gjørdu teir ein vørr at byrja við í hvørjum hálvleiki móti Esbjerg fB, men tað rakk so ikki eins langt og tað gjørdi niðri í Esbjerg. Fyrra dystin tapti NSÍ eftir eitt gott avrik 3-1, men nú spælt varð á heimavølli, endaði tað við 4-0 tapi. Esbjerg fB syrgdi fyri tveimum málum í hvørjum hálvleiki, og so var atgongumerkið greitt til annað umfar í InterToto Cup-kappingini, har franska Nice er mótstøðuliðið.

Sum sagt, so gjørdi NSÍ mest um seg fyrstu løtuna í fyrra hálvleiki og fyrstu løtuna í seinna hálvleiki. Men yvirmaktin var nokk ov stór, tí ikki megnaðu runavíkingar á heimavølli at umseta kjansirnar til mál. Serliga allarfyrst í dystinum legði NSÍ væl út, og beinanvegin var ein møguleiki. Ian Højgaard fann Jónstein Petersen frammi í vinstru síðu, har hann setti tveir verjuleikarar av, áðrenn hann sendi innfyri. Har stóð Súni Fríði Barbá, men skundaði sær so nógv at avslutta, at bólturin varð skotin væl við síðuna av málinum.

Einar tvær ferðir aftrat var NSÍ framvið, men tað gjørdist ikki meira enn til hálvar kjansir hesa fyrstu løtuna, áðrenn Esbjerg fB hevði fingið fótin fyri seg í nógva vindinum á Svangaskarði leygardagin. Í fyrra hálvleiki hevði Esbjerg fB vindin undan.

## Gjørdu skjótt av

Tá so donsku bronsuvinnararnir raknaðu við, gjørdu teir eisini skjótt av. 25 minuttir vóru farnir, tá tað eydnaðist liðformanninum, Jess Thorup, at finna Jan Kristiansen, ið fekk sent bóltin í málið, og bara hálvanannan minutt seinni var tað Anders Egholm, ið eftir hornaspark fekk pláss og stundir at venda sær á og skjóta - so var 2-0.

Undan hesum høvdu tekin verið um, at gestirnir mundu fara at fáa okkurt mál, tí beint frammanundan hevði Hans H. Andreasen sent beint fram við afturu stong og Jess Thorup skotið á stongina.

Nú málini so vóru komin, fekk Esbjerg fB sett spælið hjá sær upp í ferð, og ofta var trupult hjá NSÍ-arunum at fylgja við. Tó spurdust ikki so øgiliga nógvir málmøguleikar burtur úr danska spælinum.

Í seinna hálvleiki legði NSÍ aftur bragdliga fyri, og aftur var tað Súni Fríði Barbá, ið fekk størsta kjansin. Sjúrður Jacobsen sendi hornaspark innfyri úr høgru síðu, og við aftaru stong setti Súni Fríði høvdið á, men á stongina og út.

Sum dystinum leið, setti Esbjerg fB seg meira og meira á hann, men kortini fekk Jens Martin Knudsen aftur hesa ferð pilkað svenska framherjan, Fredrik Berglund, niður. Heilar tríggjar ferðir slapp Berglund leysur, men hvørja ferð fekk Jens Martin blokerað, so einki kom burturúr.

Hinvegin fekk topphúgvumaðurin einki gjørt, tá Esbjerg fB aftur innan fyri lítla løtu í seinna hálvleiki sendi bóltin í málið tvær ferðir aftrat. Fyrst skoraði Jakob Poulsen til 3-0 við einum fløtum skoti í 69. minutti, og bara fýra minuttir seinni varð Jan Kristiansen fríspældur av Fredrik Berglund og kundi økja til 4-0.

## Tankarnir aðrastaðni

Sjálvt um Esbjerg fB hevði fult tamarhald á síðsta hálva tímanum av dystinum, royndi NSÍ av og á at sleppa longur fram á vøllin, og í triðsíðsta minutti mundi tað eisini givið úrslit. Ein misskiljing í verjuni hjá Esbjerg fB gjørdi, at Jónstein Petersen við sínum skjótleika vann kapprenning við málverjan, Lars Winde, men mátti síggja bóltin bresta í yvirliggjaran…

Donsku gestirnir tóktust yvirhøvur væl nøgdir við úrtøkuna, men hinvegin gjørdi NSÍ síðstu 15-20 minuttirnar nakrar útskiftingar, ið kundu bent á tað borðið, at onkrir av leikarunum vórðu spardir til oddadystin móti HB í annaðkvøld, ið man hava heldur størri týdning fyri felagið enn at renna eftir einum ógvuliga lítlum møguleika fyri víðari InterToto Cup-luttøku.

Jústinus R. Hansen avloysti Gert Langgaard á miðvøllinum og Andy Olsen fór í álopið fyri Helga L. Petersen. Hinvegin var eitt nú Aleksandar Jovevic als ikki brúktur leygardagin.

Europeisku royndirnar hjá NSÍ eru nú tvífaldaðar, og samlaða úrslitið var eitt vet betri enn í fjør. Í dystinum leygardagin fekk NSÍ í løtum givið donsku bronsuvinnarunum góða mótstøðu, men megnaði kortini ikki at verja seg ímóti at tapa. Hinvegin eru fýra mál óivað eisini á leið tað, ið kann væntast at vera munurin á føroyskum og donskum fótbólti.

### InterToto Cup

Leygardagin 26. juni 2004 á Svangaskarði

### NSÍ-Esbjerg fB 0-4 (0-2)

0-1: Jan Kristiansen, 25.
0-2: Anders Egholm, 27.
0-3: Jakob Poulsen, 69.
0-4: Jan Kristiansen, 73.

**NSÍ:** Jens Martin Knudsen - Brynjolvur Nielsen, Óli Hansen, Dánial Hansen, Sjúrður Jacobsen (Áki L. Hansen, 71.) - Gert Langgaard (Jústinus R. Hansen, 68.), Ian Højgaard, Kári Hansen - Helgi L. Petersen (Andy Olsen, 71.), Súni Fríði Barbá, Jónstein Petersen

**Gul kort:** Ian Højgaard, 14. og Óli Hansen, 56.

**Esbjerg:** Lars Winde - Jerry Lucena, Kjetil Pedersen, Anders Egholm, Martin Jensen (Tommy Løvenkrands, 66.) - Søren Barslund (Lasse Kryger, 68.), Hans Henrik Andreasen, Jakob Poulsen - Jan Kristiansen, Fredrik Berglund (Jesper Jørgensen, 83.), Jess Thorup

**Gult kort:** Kjetil Pedersen, 32.

**Áskoðarar:** 500

# Tryggur sigur til B71

**Sandoyingar endaðu fyrru hálvu við einum trivaligum 5-0 sigri á B36 heima á Sandi**

2 DEILD
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

B71 vann ein tryggan 5-0 sigur á B36, tá ið liðini hittust á Sandi leygardagin. Hálvleiksstøðan var 2-0 til heimaliðið.

## Eingin ivi

Tað var Jónsvein Thomsen, ið legði heimaliðið á odda 1-0, tá ið okkurt um ein hálvur tími var leiktur av dystinum. Stutt fyri hálvleik økti veteranurin Eli Hentze til 2-0 eftir gott uppspæl úr vinstru síðu.

Eingin ivi var um, hvat var betra liðið, og serliga eftir steðgin var B71 einaráðandi. Hanus Clementsen økti til 3-0 við einum góðum langskoti, og Eirikur Poulsen gjørdi tað til 4-0, tá ið hann fangaði ein leysan bólt inni í brotsteiginum hjá B36. Síðsta málið í dystinum gjørdi brasiliumaðurin, Clayton Soares, tá ið hann sendi eitt beinleiðis fríspark í málið til 5-0, sum sostatt gjørdist endaliga úrslitið av dystinum heima á Sandi. Nú farið verður í summarfrí, liggur B71 nummar trý í næstbestu deildini, meðan árstalsfelagið úr Havn liggur nummar átta.





TÁ TÚ SKALT RØKKA MÁLINUM

Kaupthing er ein sterk fíggjarfyritøka, sum veitir professionellar tænastur og dyggar loysnir til vinnulívið. Styrkin hjá Kaupthing er støddin og útbreiðslan av deildum í 10 ymiskum londum. Við okkara tøttu altjóða sambondum fevna førleikarnir víða, og ráðgevingin hevur altíð støði í nýggjastu menningini.

www.kaupthing.fo

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag